0.21 - 200500745/5

# FØROYA KOMMUNUFELAG

Jour.nr. 02- 264_02
04-11-2005

Almanna- og Heilsumálaráðið
Eiragarður 2
100 Tórshavn
Att. Súsanna Nordendal

***Viðv. uppskotið til broyting dagstovnalógini (Fíggjarlig fripláss)***

Føroya Kommunufelag hevur á stýrisfundi 25 oktober viðgjørt uppskotið um broyting í dagstovnalógini. Felagið fegnast um broytingina, ið gevur kommununi loyvi at avgera hvør partur av kommunalu umsitingini ið skal viðgera umsóknir um fíggjarligt fripláss.

Samstundis vil Felagið mæla til at reglurnar um áseting av fíggjarligum friplássuum verða broyttar. Sum kunnugt er inntøku grundarlagið hjá kommununum sera ymiskt., og tí er tað óheppið at fíggjarlig fripláss verða latin í mun til eina standard talvu yvir skattskylduga inntøku, sum landsstýrismaðurin letur gera.

Hetta hevur við sær kommunur ið hava lágt inntøkugrundarlag koma at hava størri útreiðslur av ansingarøkinum, ið og við at fleiri fíggjarlig fripláss eru í hesum kommunum.

Felagið mælir tí til kommunurnar sjálvar fáa heimildina at avgera útrokningar grundarlagi fyri fíggjarligum friplássum.

Vegna Føroya Kommunufelag

Eyðun Christiansen

P.o.Box 73 • FO-600 Saltangará • Føroyar
Tel: (+298) 44 76 00 • Fax: (+298) 44 82 08 • E-mail: kontakt@fkf.fo • Heimasíða: www.fkf.fo